# HEILSANIR



**Kære Alexander**
Tillykke med de 3 år den 22. febr.
**Ønsker omma og abbi**



**Góði elskaði Regin Ingi**
Lukku og gleði á tínum 7 ára føðingardegi 21. febr. Jesus pápi signi framtíð tína.
**Ynskja mamma, babba, Heidi og David**



Vit vilja takka øllum, sum gleddu okkum við gávum, blómum og fjarritum á hjúnabandsdegi okkara 3. mai 2003, og gjørdu okkum dagin ógloymandi.
**Heilsan Henny og Magni**



**Góða Barbara**
Hjartaliga tillukku við sjey ára føðingardegnum. Bestu heilsur frá **Guðrið fastir í Hadsten**



**Allarbesta Kristianna**
Nú ert tú líka nógv ár sum eg. Stuttligt tá vit vóru sjálvar í Klaksvík. Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 16. febr.
**Allarbestu heilsanir frá Elin**



**Mostirsa lítla frella**
Nú ert tú blivin stór – 1 ár. Hjartaliga tillukku við føðingardegnum 16. febr.
**Bestu ynskir frá mostir og Jacob**



**Góði Sverri**
Hjartaliga tillukku við 9 ára degnum í dag ynskja vit øll tær. Frá okkum í húsinum.
**Omma**



Eg og foreldur míni takka hjartaliga fyri vitjan, heilsanir og alla hjálp á konfirmatióndegi mínum tann 5. okt. 2003.
**Heilsan Óluva Mohr, Tórshavn**



**Góða Jensa**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum 23. febr. Tú dugir so gott at syngja Jesus er besti vinur barnanna, altíð er hann hjá mær, aldri fer hann frá mær.
**Heilsan Alma-omma**



**Góða Rósa**
Hjartaliga tillukku við 3 ára føðingardegnum. Eisini tillukku við lítlabeiggja. Jesus signi framtíð tína.
**Kærastu heilsanir omma, abbi og Erla fastir**



**Góði elskaði babba**
Hjartaliga tillukku við 20 ára degnum tann 18. febr. Eg elski teg.
**Heilsan Per**

## Heilsanir

30,- kr. Sosialurin

**5 ferðir um vikuna**

### Gevið gætur

Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 30,- kr. fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.
❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................
..........................................................................

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ..........................................................................
Bústaður: ..........................................................................
Bygd/býur: .................................... Tlf.: .................

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Sosialurin**
Postsmoga 76 •110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**Heilsanir**«

## Morgunlestrar
**23.–28. februar**

***Jógvan Fríðriksson, prestur, lesur***

**Sálmar:**

**Mánadagin 23. februar:**
nr. 486 Hjá Jesusi eg søki frið
nr. 468 Frelsari, hevði ikki eg teg funnið

**Týsdagin 24. februar:**
nr. 487 Mín Guð, eg vil ei víkja

**Mikudagin 25. februar:**
nr. 168 Legg nú niður verðsligt sinni

**Hósdagin 26. februar:**
nr. 38 Nærri, mín Guð, til tín

**Fríggjadagin 27. februar:**
nr. 19 Nú takkið Guði øll
nr. 384 Takk, Jesus, takk! Mín sál er fró

**Leygardagin 28. februar:**
nr. 57 Mær halda Harrans hendur
nr. 61 Í Harrans hondum eri eg




**Vika 8 – 18. februar**
Vinnaratøl: **08 - 14 - 16 - 38 - 43 - 47**

Eykatøl: **17 - 26**

| | |
|---|---|
| 6 vinnaratøl: | **1.949.505,- kr.** |
| 5 vinnarat.+ eykatal | **340.713,- kr.** |
| 5 vinnaratøl: | **4.497,- kr.** |
| 4 vinnaratøl: | **140,- kr.** |
| 3 vinnaratøl: | **43,- kr.** |

Sosialurin tekur onga ábyrgd av møguligum villum



# TILTØK

**Gudstænastur Føstuinngangur**
*Gjógv:* kl. 12 messa, Emil Olsen
*Skála:* kl. 11,
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Skótar luttaka í samb. við hugsunnardag teirra. Bergur D. Joensen
*Havnar kirkja:* Kl. 11, Talvan gongur fyri heimamissiónina. Bjarni Bæk
*Kaldbak:* kl. 12, Sonja Klein
*Hvannasund:* altarg., Talvan gongur fyri Kirkjuligu Heimamissiónina. Elsa Funding
*Klaksvíkar Sjúkrahús:* kl. 10,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Christianskirkjan:* kl. 11, lestur. Innsavnað verður fyri skótahjálpina
*Gøta:* kl. 12, altarg., Martin R. Jacobsen
*Vestmanna:* kl. 12, Mogens T. Christensen
*Sørvágur:* kl. 12, altarg., David Johannesen
*Hósvík:* kl. 12,
*Kollafjørður:* kl. 15, Familju- og skótagudstænasta, Inga Poulsen Dam
*Skálavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Rituvík:* kl. 11,
*Søldarfjørður:* kl. 18, altarg., Meinhard Bjartalíð
*Leirvík:* kl. 12, altjóða hugsunnardagur, skótar luttaka
*Funningsfjørður:* kl. 16, Uni Næs
*Fámjin:* kl. 12, altarg., Jónsvein Bech

**Ebenezer**
Leygardagin kl. 16 Eldrasamkoma.
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.
Týsdagin kl. 17 Frítíðararbeiði, kl. 20 Sangvenjing.
Mikudag kl. 17.30 Awana fyri børn í 1., 2. og 3. flokki, kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti. Øll eru vælkomin.
Hósdagin kl. 20 Ungdómsmøti.

**Á Fløtum, Landavegur 98**
Bíbliugransking við Pætur M. Hansen verður mánakvøldið kl. 20, evnið Galatiabrævið. Øll eru vælkomin.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti og samstundis verður barnaansing. Kl. 11.30 Samvera við drekkamunni. Kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 12 verður eisini Møti, har Øssur Berghamar talar. www.hebron.fo

**Katólska Kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudag kl. 11 Hámessa v/ Marcelin Rediu, prestur í Mariukirkjuni. Kl. 14 Sunnudagsskúli.

**Lívdin í Hoyvíkar skúla**
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Elisabeth Mortensen um evnið: »Náði Guds í lívi Hannu« og á tilbiðjarnarmøtinum kl. 12 talar Jógvan Z. um evnið: Bíblian, tónleikur og samkoman – annar partur«. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum. Sunnudagsskúli kl. 12. Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 20 Bøn og bíbiltími har Jógvan Z. undirvísir um Opinberingina. www.livdin.fo

**Missiónshúsið við Landavegin**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli á vanligu støðunum, kl. 18 Møti við Jústines Poulsen.

**Frelsunarherurin, Tórsgøta 19**
Leygardag kl. 20 Møti í Kollafirði major Njál Djurhuus talar.
Sunnudagin kl. 11 Møti, kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.
Mánadagin kl. 17 Småskótamøti, kl. 19 stórir skótar.

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagin kl. 15 í KFUK: Eldrasamkoman við Sverra Steinhólm presti. Evnið: Hósea profetur.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17 Landsbøn.
Í morgin kl. 11 Morgunmøti, evnið: Rættvísgjørd í Kristusi 1. partur, talari: Tummas Jacobsen, kl. 11.50 Barnagudstænasta, kl. 18 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Rhema**
Sunnudagin kl. 17 Møti og sunnudagsskúli.

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Tummas J. Askham.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.
Mikudagin kl. 7 Bønarmøti.
Páskastevna verður í Høllini á Hálsi í døgunum 8. til 12. apríl.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00: Morgunmøti og kl. 18.00: Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
22. februar Møti v/ Petur F. Johannesen, Skála.

**Missiónsvika í skúlanum í Kaldbak**
Í kvøld kl. 20 talar Regin Olsen, Mourits Mouritsen endar. Sangur: Meinigheitskórið í Havn.
Sunnudagin kl. 15 Sunnudagsskúli, kl. 18 talar Alfred Petersen. Sangur: Manskórið í Havn. Bønarmøti verður øll kvøldini hálvan tíma áðrenn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Frelsunarherurin, Kollafjørður**
Leygardagin kl. 20 hevur Frelsunarherurin møti í Missiónshúsinum í Kollafirði, major Njál Djurhuus talar. Øll eru vælkomin.

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin verður morgunmøti við breyðbróting og dópi kl. 11 við Eiler Johannesen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið opið hús fyri ung kl. 20.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Jóhan P. Jóhannesen, Rasmus og Jóhan P. syngja. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 19 Møti við Henning og Lissi. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Berøa, Saltangará**
Á møtinum sunnudagin kl. 18 talar Levi Joensen og aðrir. Sangarar úr Betesda luttaka.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Skráin fyri missiónsvikuna 2004 á Glyvrum:
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti har Jógvan Højgaard talar.
Mánadagin kl. 19.15. Bøn og lovsangur, kl. 20 Meinhard Bjartalíð talar, Magni Christiansen talar.
Týsdagin kl. 19.15 Børn og lovsangur, kl. 20 Regin Høgnesen talar, Glyvra Streingjakór syngur.

**Missiónshúsið Tabor á Toftum**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20 Evnið verður »Syndanna fyrigeving« v/ Tummas og Jaspur.

**Thabor, Fuglafjørður**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 21.
Sunnudagin kl. 14.30 Sunnudagsskúli á Kambsdali og í Thabor og kl. 18 Møti.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30.
Tim 5 verður mánadagin kl. 17.30 og Ungdómsmøti kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 18 Bønarløta.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn- og lovsangsløta, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Kl. 11 Smáir einglar møta, kl. 14 Sólstrálan, kl. 17 Stríðsmenn møta.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Einki møti. Vælkomin í Betania.

**Betesda í Norðoyggjum**
Kl. 11 Minnismáltíð Harrans, kl. 12.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Yngra kvartettin skipar fyri evangeliska fundinum við góðum felagssongi, kórsongi og kvartett.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 18 Møti. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Leygarkvøldið kl. 23 Ungdómskvøld. Ung úr Hoyvík luttaka.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti við luttøku úr Hoyvík.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**KFUM & K, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Óla Marner Christiansen, kl. 21 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Leygarkvøldið kl. 21 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Terja Nielsen og Helenu Petersen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Hilmar Bech. Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. møti, major Njál Djurhuus talar.
Týsdagin kl. 20 Heimaforbundið.

**Sion, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Mánakvøldið kl. 21 Bønarmøti og Bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Betel, Vágur**
Leygardagin kl. 20 Ungdómsfundur.
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20 Uppbyggingarfundur.

**Missiónshúsið í Porkeri**
Missiónsvikan byrjar týskvøldið 4. februar kl. 20 við presti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.

***Mánadagur 23. februar***
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.15-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, telving, landastrok og onnur spøl. Tilmelding til døgurðan miku- og fríggjadagin tlf. 316491
Føðingardagur og ársfundur verður 12. mars. Val verður av tveimum nevndarlimum. Øll uppskot eru vælkomin í postkassan í Tilhaldinum.

***Týsdagur 24. februar***
kl. 10-11.30 Sangur, F. og B. Samuelsen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 14 »Ábyrgd fyri egnari heilsu« Heilsugóður kostur, Jóhanna á Tjaldrafløtti. Framsýning verður á Ólavsøku av barnamyndum frá 30'- og 40'unum og brúðarmyndum frá 30'-60'unum. **Allar myndir eru vælkomnar.**

***Mikudagur 25. februar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. Tilmeld. tlf. 316491
kl. 15 Túrur
**kl. 17-21 Opið hús**

***Hósdagur 26. februar***
kl. 10-110.30 Fimleikur, Sonja Danielsen.
kl. 14-17 Telduprát, Brandur Petersen

***Fríggjadagur 27. februar***
kl. 10-13 Matgerð, Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði. Høvi er at koma sum gestur. tilmelding mánadag tlf. 316491
kl. 13-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Vágs Pensionistafelag**
Vágs Pensionistafelag – felagið fyri pensionistar í Suðuroyar sunnaru helvt – hevur limafund kl. 19.00 hvønn seinasta mánadag í hvørjum mánaða. Ymiskt áhugavert er á hvørjum fundi, har tú eisini fært drekkamunn við bollum og køkum. Fundirnir verða hildnir í hugnaligu hølunum hjá Vágs Matmøðrafelag. Allir pensionistar og øll omanfyri 60 ár eru vælkomin. Gerst limur í Vágs pensionistafelag.


Hagstova Føroya er sjálvstøðugi hagtalsstovnur landsins. Stovnurin er í trimum deildum - Hagtalsdeild, KT-deild og Útgávudeild, sum samstarva um at veita almenninginum góð og skjót hagtøl um so nógv viðurskifti sum til ber. Á stovninum arbeiða 15 fólk - búskaparfrøðingar, samfelagsfrøðingar, KT-tøkningar og skrivstovufólk.




STARV Á HAGSTOVUNI

HAGSTOVAN HEVUR TØRV Á FÓLKI TIL FÓLKAHAGTØL, SERLIGA ÍBÚGVAHAGTØL, ARBEIÐSMARKNAÐARHAGTØL OG INNTØKUHAGTØL.

Til at hava hesa uppgávu um hendi, sóknast vit eftir einum væl útbúnum fólki. Verkætlanirnar í hesum sambandi fara fram í tøttum samstarvi við KT tøkningar og tí vera eisini krøv sett um góð samstarvsevni og góð samskiftisevni um dataskipanir.

Besti førleiki er akademisk samfelagsfrøðilig útbúgving, men hevur tú aðra hægri útbúgving og harafturat royndir ella serligan áhuga í samfelagsmálum, kann hetta vera nøktandi førleiki til starvið. Royndir av arbeiði við telduforritum og datagrunnum geva fyrimun.

Starvið verður lønt eftir galdandi sáttmála millum Landsstýrið og avvarðandi fakfelag.

Umsóknirnar skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 1. mars 2004.

Vil tú hava meira at vita um starvið, set teg í samband við Axel Nolsøe, deildarleiðara, ella Hermann Oskarsson, stjóra, á Hagstovu Føroya, telefon 352800.

team85 tel 358000

HAGSTOVA FØROYA
TRAÐARGØTA 39 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX +298 35 28 01 · HAGSTOVA@HAGSTOVA.FO · WWW.HAGSTOVA.FO